## Uttan Gøtu og Klaksvík

Tey, sum hava tikið seg saman um at byggja eina fótbóltshøll í Runavík, hava gjørt av at halda fram við verkætlanini, sjálvt um Klaksvíkar kommuna og Gøtu kommuna hava valt at vera uttanfyri. Sjey kommunur taka undir við verkætlanini. Tær eru Sunda, Eiðis, Sjóvar, Runavíkar, Leirvíkar, Fuglafjarðar og Funnings kommuna. Høllin er mett at kosta millum 55 og 60 mió. krónur, og av tí skulu kommunurnar rinda 9 mió. krónur.

## Ivi um húsaprísir

Tað stendur ikki á hjá teimum føroysku húsameklaravirkjunum at fáa hús á sølulistan, og sambært Útvarpinum standa ikki færri enn 60 fastar ognir í høvuðsstaðarøkinum til sølu. Hinvegin tykist áhugin fyri at keypa ikki at vera so stórur, sum hann hevur verið, og tað minnir um gongdina í útlondum. Men stjórin í Skyni. Tórgunn Davidsen, sigur við Útvarpið, at tað er ikki trupult at selja hús, og viðurskiftini eru ikki sum í útlondum, sigur hon.

Heðin Mortensen, borgarstjóri:

# Byggingin kann nú halda fram

**Fundur hevur nú verið millum grannarnar og býráðið, og sambært Heðini Mortensen, borgarstjóra, er semja um ein leist at loysa málið soleiðis, at unga parið á Argjum aftur kann taka upp byggingina**



*Nú sleppa Arngerð Diana og Jan aftur undir byggingina av húsunum úti á Argjum*

BYGGIMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Eftir at Sosialurin mánadagin varpaði ljós á eitt byggimál á Argjum, har eitt ungt par varð steðgað í teirra bygging av nýggjum sethúsum, er longu nú ein loysn í eygsjón.

Sum greitt frá í blaðnum mánadagin bleiv byggiloyvið, sum kommunan hevði útskrivað fáar mánaðir framman undan, kallað aftur við tí úrsliti, at húsini stóðu í hálvum gekki.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, setti seg beinanvegin inn í málið, og longu í gjárkvøldið var fundur millum húskini í grannalagnum og býráðið, og eftir hendan fundin tykist nú greitt, at unga parið kann taka byggingina upp aftur.

- Vit høvdu ein góðan fund, har vit tosaðu út um viðurskiftini. Øll vóru samd um ein leist at loysa málið eftir, og í síni heild var fundurin ógvuliga positivur, sigur Heðin Mortensen.

### Ikki ognartøka

Býráðið hevði mannað seg væl við nógvum fólki frá umsitingini til hendan fundin, og lagt var upp til eina loysn, sum er í tráð við viðurskiftini í kommununi annars. Men ein ognartøka kemur eftir øllum at døma ikki upp á tal.

- Nei, tað hevði blivið ov trupult og hevði tikið ov langa tíð, so tað er ikki ein av loysnunum, vit umhugsaðu, sigur Heðin Mortensen.

Ein av andstøðulimunum í býráðnum, Høgni Mikkelsen, hevði eisini ætlað sær, at málið skuldi fáa eina skjóta loysn. Heðin Mortensen hevur tó bara ta viðmerking, at tað sjálvandi ikki verður ein andstøðulimur ið ger av, um og hvussu býráðið útskrivar byggiloyvir og avgreiðir síni mál annars.

Ein kann so spyrja, hví tað skuldi verða neyðugt, at Sosialurin setti kikaran á málið, áðrenn tað bleiv loyst. Hinvegin skal tað tæna borgarstjóranum til rós, at hann beinanvegin reageraði og fekk gongd á málið.



*Heðin Mortensen kallaði grannarnar inn til fund longu í gjárkvøldið - og nú hevur maálið so funnið eina loysn*

Høgni Mikkelsen, andstøðulimur:

# Kravdi málið fyri býráðsfund



**- Verður byggiloyvið til Arngerð Dianu Hansen og Jan Joensen ikki skrivað út av nýggjum áðrenn vikan er farin, krevji eg málið fyri á býráðsfundi, segði Høgni Mikkelsen fyrr í vikuni**

BYGGIMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Høgni Mikkelsen, býráðslimur í Tórshavnar kommunu, gjørdist ovfarin, tá hann sá greinina í Sosialinum mánadagin um afturkallaða byggiloyvið til eini sethús á Argjum.

Hann dugir als ikki at síggja, at nakar trupulleiki skal verða við hesum byggiloyvinum, og áleggur beinleiðis býráðnum at fáa hesi viðurskifti í rættlag beinanvegin.

Nú er tað ikki eitt ókent fyribrigdi, at øll viðurskifti ikki altíð eru í lagi úti á Argjum, tí í førum tykist tað, sum er gamla Argja Kommuna farin »lætt og elegant« tvørtur um smálutir so sum privatognarvegir.

Høgni Mikkelsen vísir tó á, at í hesum førinum eiga atkomuviðurskiftini ikki at verða ein trupulleiki, og andstøðulimurin vildi krevja málið fyri býráðsfund, um unga parið ikki slapp at halda fram við byggingini.

Nú sær kortini út sum at hetta ikki verður neyðugt, tí borgarstjórin hevur funnið eina loysn á málinum.